

# Fleiri oljufeløg enda í skiftirættinum

**Jógvan Hugo Gardar**

26.12.2015 - 17:52

Oljan.fo

Tøl hjá Federal Reserve Bank of Dallas í USA vísa at metnógv olju- og gassfeløg eru síðani fíggjarkreppuna endaði í skiftirættinum. Hetta veit Bloomberg News at siga frá.

Sambært Bloomberg hava bara í fjórða ársfjórðingi í ár,minst níggju amerikansk olju- og gassfeløg, við meir enn tveimum milliardum dollarum í skuld,valt at fara í skiftirættin, tí tey ikki síggja nakrar møguleikar at yvirliva undir verandi umstøðum í olju- og gassmarknaðinum.

- Lægri oljuprísir hava rakt fíggjarliga hart amerikansku olju- og gassfeløgini, millum annað tí at framleiðslukostnaðurin hjá amerikansku framleiðarunum er hægri enn hjá altjóða kappingarneytunum, skrivar greinararnir Navi Dhaliwal og Martin Stuerner, sambært Bloomberg.

Teir leggja afturat at um gongdin heldur fram, so gerst 2016 enn døkkari fyri amerikanska oljuídnaðin.

Teir skriva eisini at síðani oktober 2014 so eru fleiri enn 70.000 størv í amerikanska olju- og gassídnaðinum horvin.